Kommunufelagið

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Dagfesting
2. februar 2016

Okkara j.nr.
16/00679-2

Málsviðgeri
Jóhan J. Lamhauge

Tygara j.nr. 16/00106-1

**Viðv.: uppskoti um broyting í løgtingslóg um barnavernd**

Víst verður til uppskot til "Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (flytan av kærumyndugleika í avgerðum um val av fosturforeldrum)", dagfest 26. januar 2016, ið er sent Kommunufelagnum og Barnaverndarstovuni til hoyringar.

Kommunufelagið og Barnaverndarstovan hava onki at viðmerkja til innihaldi í nevnda uppskoti.

Sambært vanligari mannagongd, er uppskotið sent til einstøku kommunurnar og barnaverndartænasturnar til møguligar viðmerkingar, men orsakað av stuttu hoyringarfreistini, hevur uppskotið ikki fingið vanligu viðgerðina á stýrisfundi í Kommunufelagnum.

Barnaverndartænasturnar kring landið hava ikki gjørt viðmerkingar til uppskotið, tó undantikið Barnaverndartænastan Veks, ið við skrivi, dagfest 29. januar 2016, hevur gjørt viðmerkingar, ið verða hjálagdar í avriti.

Vegna Kommunufelagið

Heðin Mortensen, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

Vegna Barnaverndarstovuna

Oddbjørg Balle, leiðari

Oyrarbakki 29.01.2016

**Viðmerkingar til uppskot um broyting í løgtingslóg um barnavernd.**

Barnaverndartænastan í VEKS hevur hesar viðmerkingar í sambandi við, at Almannamálaráðið ynskir at flyta kærumyndugleikan í málum um avgerð um val av fosturfamilju frá kærunevndini í almanna- og heilsumálum til Høvuðsbarnaverndarnevndina.

Tað er umráðandi, at Høvuðsbarnaverndarnevndin er, og framhaldandi verður eitt óheft organ, sum hevur til uppgávu at taka avgerð í barnaverndarmálum, sum barnaverndarlógin ásetur.

Tað kann ongantíð verða ein fyrimunur, at Høvuðsbarnaverndarnevndin, sum er eitt óheft organ, eisini skal virka sum ein kærustovnur.

Sum grundgeving fyri, at hendan broyting verður framd, skrivar AMR:

"Føroya Kærustovnur, ið hevur um hendi skrivstovuna hjá bæði kærunevndini í almanna- og heilsumálum og Høvuðsbarnaverndarnevndini, hevur gjørt vart við, at avgerðin um at leggja kærumyndugleikan til kærunevndina er óheppin grundað á, at kærunevndin, ið er mannað við løgfrøðingi, lækna og sosialráðgeva, ikki hevur serliga vitan í hesum serstøku málum, ið eisini hava beinleiðis tilknýti til avgerðina um umsorganaryvirtøku. Høvuðsbarnaverndarnevndin, ið tekur avgerð um umsorganaryvirtøku, er hinvegin mannað við royndum løgfrøðingi, sálarfrøðingi og barnasakkønum. Grundað á samansetingina og serkunnleikan í nevndini eins og at limirnir í nevndini hava eina serliga vitan um hvørt einstakt mál við tað at málið um umsorganaryvirtøku frammanundan hevur verið viðgjørt í nevndini, verður mett, at Høvuðsbarnaverndarnevndin er betur skikkað til at vera kærumyndugleiki í hesum málum. "

Tað at kærunevndin í almanna- og heilsumálum er mannað við løgfrøðingi, lækna og sosialráðgeva er ikki eitt argument fyri, at Høvuðsbarnaverndarnevndin skal virka sum ein kærustovnur. (Løgfrøðingurin er har longu – sosialráðgevin er barnasakkønur, og er har longu), - t.v.s., at tá kærunevndin í almanna- og heilsumálum viðger kærur í málum um avgerð um val av fosturfamilju, kann kærunevndin biðja sálarfrøðing um at verða við í viðgerðini av kæruni.

Vinarliga

Beinta J. Mørkøre

**Leiðari fyri Barnaverndartænastuna í VEKS**

**Sunda kommuna**

**Oyrarbakkavegur 3**

**Postboks 10**

**400 Oyrarbakki**

**Tlf. 667271**

beinta@sunda.fo